Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Lendisætlan fyri Føroyar og matrikulering

Spurningar:

1. Er ætlanin at gera eina lendisætlan fyri Føroyar?
2. Um so er, er ætlanin at taka atlit til staðbundnu umstøðurnar í Føroyum?
3. Er ætlanin at taka kommunurnar við í viðgerðina?
4. Er ætlanin at raðfesta matrikulering hægri í Føroyum?

Viðmerkingar:
Føroyar eru eitt fjallaland, har lendið er grýtut. Moldin er grunn í flestu støðum í fjøllunum. Niðri í dølum og út móti firðum er betur vallað. Har hava fólk ígjøgnum ættarlið lagt haga inn til grønkandi bø. Nógvur bøur liggur ósligin í dag og kundi verið brúktur betur. Eitt nú til stráfóður, grønmeti og velting.
Nú eftirspurningurin eftir byggilendi er stórur, og bygt verður um alt landið, verður nógv innangarðsjørð, eins og uttangarðsjørð, løgd til byggilendi. Hetta kann vera neyðugt fyri at nøkta tørvin. Men spurningurin er, um atlit verða tikin til framtíðina og okkara eftirkomarar, tá tað snýr seg um landbúnað og brúksmøguleikar hesum viðvíkjandi, og um raðfestingar og býarplanlegging verða samantvinnað við, hvar besta landbúnaðarjørðin er.
Vandi er fyri, at Føroyar um stutta tíð eru uttan innangarðsjørð, og tí ikki hava nakað lendi at velta eplir, grønmeti v.m. í - heldur ikki hjá føroyskum húsarhaldum. Summir bøndur leggja í dag nýlendi inn einamest til stráfóður. Henda jørð kann tó ikki samanberast við gomlu innangarðsjørðina, sum hevur nógv ár á baki og hevur nógv betri mold. Á Sandi hevur mann góðar royndir við at dyrka grønmeti.
Sjálvandi eru nógvir áhugapartar í eini tilgongd at gera eina lendisætlan, og kommunurnar eru týdningarmiklir hoyringarpartar.
Røddir í kommunala geiranum hava verið frammi um, at tilgongdin at ogna sær byggilendi er ov long. At m.a. matrikuleringstilgongdin seinkar byggiætlanum almikið. Her er ein avbjóðing, sum kundi verið loyst, tó at atlit verða tikin til gomlu landbúnaðarjørðina.
Føroyska náttúran er viðbrekin, og landbúnaðarjørðin er lítil í vavi. Summar bygdir og býir hava so at siga onga innangarðsjørð eftir. Tað kann fáa keðiligar avleiðingar fyri framtíðina, landbúnaðin í framtíðini og Føroyar sum sjálvberandi matvøruframleiðara í framtíðini.
Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 1. desember 2021

Jóhannis Joensen